## Landsliðsvenjari til ÍF

Í vikuni stóð greitt, at Boban Ilic ikki heldur fram sum venjari hjá flogbóltsmonnunum hjá ÍF. Hann fer nevnliga at venja Mjølnir, men tað merkir undir ongum umstøðum, at ÍF stendur uttan venjara. Tað er nevnliga greitt, at Suni Hansen, sum annars hevur verið hjálparvenjari hjá manslandsliðnum, verður nýggjur venjari hjá fuglfirðingunum.



## Gurið skal venja VB

Gurið Mortensen verður ikki at síggja sum spælari hjá hondbóltskvinnunum hjá VB í vetur. Gurið er nevnliga við barn, og so er líka sum trupult at hava ein leiklut á vøllinum samstundis. Hinvegin stendur greitt, at tað verður Gurið, sum skal standa á odda fyri einum rættiliga umskipaðum VB-liði. Gurið verður nevnliga venjari hjá einum liði, sum í ár skal standa seg uttan útlendsku stuðlarnar, sum liðið hevur notið gott av seinastu árini. Ístaðin verður satsað upp á egnar spælarar, sum hóast alt ikki eru so heilt fáar í tali.

AB-ÍF 4-2 (1-1):

# Illa klóraðir fuglfirðingar

AB

ÍF

**Í tjúkka mjørkanum úti í Vika, sum á degnum varð doypt til Mjørkadal, megnaði ÍF lítið og einki at gera við eitt væl tendrað heimalið, ið mest sum hevur tendrað jólaljós hjá viðhaldsfólkum sínum**




Jákup Mørk

At spæla við hvítum troyggjum í tjúkkum mjørka er kanska ikki heilt optimalt.

Um tað var hetta, sum var atvoldin, ber illa til at staðfesta, men veruleikin var í øllum førum, at fuglfirðingar høvdu sera ilt við at finna nakað sum helst, tá teir vitjaðu á Argjum sunnudagin.

Millum áskoðararnar var eisini landsliðsvenjarin, Brian Kerr, men hann mundi helst – eins og restin av áskoðarunum – hugsa um, hvar helvtin av dystinum gekk fyri seg.

### Rasmus og Nikolaj

Vánaliga sýnið darvaði kanska ikki heilt so nógv fyri steðgin, tá támið hóast alt hevði hug at lætta sær nakað av og á.

Bárðir partar royndu at skapa sær nakað fram eftir vøllinum, soleiðis at tey við einum sigri kundu veittra endaliga farvæl til botnstríðið, og tað var AB, sum fyrst á tí slóðina.

Rasmus Nielsen, sum við kvikleika sínum var ein støðug hóttan móti heldur tungu verjuni hjá ÍF, sendi væl innfyri úr vinstru, og so var Nikolaj Eriksen flatur í luftini og til reiðar at stúta bóltin inn.

Eftir hetta læt AB nógv av spælinum til ÍF, og eftir nakrar vandamiklar støður, eydnaðist tað Nenad Saric at javna, tó at hann varð hampuliga væl hjálptur av Morten Overgaard, sum avrættaði skotið.

Málið skuldi kanska veruliga sparka gongd í ÍF, men effektin gjørdist júst tann øvuta.

Onkursvegna fóru gestirnir aftur niður í ferð, og veruleikin er, at hendan ongan tíð varð sett upp aftur.

Longu undan steðginum mundi gingið galið, tá Poul Ennigarð valdi at bíða við at gera fríspark, til Rasmus Nielsen var komin inn í brotsteigin, men Andras Ganga bjargaði tó tí støðuni, tá hann forðaði Stig Roar Søbstad í at skora.

Men eftir steðgin beyð ikki bøtur. Nikolaj Eriksen legði aftur AB á odda, tá hann sera hegnisliga sparkaði returbólt upp undir tvørtræið, eftir at Rasmus Nielsen enn einaferð átti forarbeiðið. Morten Overgaard økti til 3-1, tá hann var kvikastur at fanga leysan bólt eftir horna, og Søbstad økti aftur, tá hann við innaru síðuni stýrdi frísparksroynd frá Janusi M. Joensen í málið.

### Til reiðar til 2010

At ÍF móti dystarenda minkaði um munin, eftir at Frank Poulsen varð feldur í brotsteiginum, hevði minni upp á seg. Tá var kórið hjá frensunum longu farið at syngja, og tann sangurin steðgar neyvan hetta kappingarárið.

Og veruleikin er eisini, at AB nú heldur skal hyggja uppeftir, tá mál skulu setast fyri seinasta partin av kappingarárinum. Liðini, sum stríðast um heiðursmerkir, eru ikki meira enn hálvan annan dyst burturi, og kann formbarometrið vekslast til úrslit seinastu seks umførini, kann væl vera, at tað hóast alt verða tvey feløg úr høvuðsstaðnum millum føroysku umboðini í Europa.

Hjá ÍF er støðan framvegis tann, at teir ikki kunnu kenna seg heilt tryggar. Við seks stigum aftur til KÍ er framvegis nakað at geva av, men skal nøkur úrtøka verða seinastu seks dystirnar, er í øllum førum neyðugt við einum avriki, sum verður nakað nógv betri enn tað, sum ÍF vísti hesaferð. Og kanska skulu reyðar troyggjur eisini finnast fram, soleiðis at spælararnir finna hvønn annan betur – eisini tá tað er mjørki.



**Rasmus Nielsen, sum her er í tvídysti við Bartal Eliasen, var við uppleggum til tvey mál – umframt at vinna misnýtta brotssparkið – ein av høvuðsmonnunum í sigrinum hjá AB**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Vóru ikki klárir

Liðskiparin hjá ÍF, Bartal Eliasen, var sum so rættiliga avkláraður, tá hann eftir dystin tosaði við Rás2.

- Í fyrra hálvleiki gongur rímiligt, men tá vit koma út aftur til seinna hálvleik, eru vit slettis ikki klárir, og tað var fult uppiborið, at teir vunnu í dag.

Hvussu kunnu tit spæla fleiri góðar dystir – millum annað grannauppgerðina í Gøtu – og so koma til ein slíkan dyst og ikki vera klárir?

- Eg veit ikki, og sjálvandi kanst tú skylda uppá, at vit hava havt nógvar skaðar, sum hava argað seinastu tveir dystirnar. Men vit eru ikki nóg tendraðir í dag. Tað er veruleikin.

Og so helt Bartal Eliasen ikki so øgiliga nógv um útsagnirnar, sum fyrr í ár settu sum mál, at ÍF skuldi heilt upp í toppin at stríðast.

- Eg veit ikki, hvør hevur sett hasi málini, men tey hava so ikki serliga gott skil fyri fótbólti. Tað krevur altso meira enn eitt ár í deildini, áðrenn tú ert til reiðar at stríðast í oddinum. Vit hava sum mál at verða verandi í deildini, og tað hava vit havt leingi, segði Bartal Eliasen.

*-mørk*

## Mjørkin darvaði málverjunum

Janus M. Joensen – liðskipari hjá AB, staðfesti eftir dystin, at tjúkki mjørkin hevði darvað serliga málverjunum.

- Líkindini at spæla vóru sum so góð. Men frá vinstra bakki, har eg stóð, var ofta trupult at síggja tvørtur um vøllin. Og í steðginum tosaði Tórður um, at tað var trupult at koma út eftir innleggum, tí mjørkin tarnaði sýninum somikið nógv, segði Janus M. Joensen við Rás2 eftir dystin.

Í aðrar mátar staðfesti Janus M. Joensen, at málið hjá AB framvegis er tað sama. Nevnliga at halda sessinum í deildini.

- Vit hava ikki broytt fokus. Tað sær sjálvandi ljósari út nú, men málið er framvegis at halda sær í deildini. Alt oman fyri tað meta vit sum bonus, segði Janus M. Joensen.

*-mørk*